# – Haarder las eisini okkara bók

**- Jú, tað var sera stuttligt at fáa eitt slíkt bræv inn í skúlastovuna. Hetta var jú ikki eitt standard-bræv, men eitt bræv sum greitt segði, at hann veruliga visti, hvat stóð í okkara bók, sigur Rannveig Hofgaard, sum er lærari í 6. flokki við Hvalbiar skúla. Ein dagin herfyri fingu tey eitt serstakt takkarbræv frá Bertel Haarder sjálvum**

SKÚLI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*- Út frá brævinum frá Bertel Haarder sjálvum lesa vit, at hann hevur lisið okkara bók, siga tey í 6. flokki í Hvalbiar skúla, sum í farnu viku vóru á seturskúla í Velbastað. Í fjør góvu tey út eina bók við egnum søgum, og nú hevur so eisini ein danskur ráðharri lisið hana*

**Hvalba:** Tað er ikki á hvørjum degi, at ein føroysku skúlaflokkur fær bræv frá einum donskum ráðharra.

Tað var kortini júst tað, sum hendi fyri næmingarnar í 6. flokki í Hvalbiar skúla fyri fáum døgum síðani:

Brævið varð sent frá danska undirvísingarmálaráðharranum, Bertel Haarder, har hann takkaði flokkinum fyri bókina "Fimti á ferð", sum næmingar í hesum flokki sjálvir høvdu skrivað.

- Eg ynski tykkum øllum framhaldandi góðan lesi- og skrivihug. Hvør veit - kanska goymir ein nýggjur ævintýrskrivari seg tykkara millum, skrivaði Berthel Haarder í brævinum, sum er dagfest í Undirvísing-armálaráðnum 30. mai í ár.

### Hevði lisið bókina

Eins og allir aðrir 6. flokkur fingu næmingarnir í hesum flokki í Hvalbiar skúla eisini útflýggjaða samlingina av ævintýrum eftir H.C. Andersen undir eini samkomu í Norðurlandahúsinum fyrr í ár.

Teir 16 næmingarnir í flokkinum vóru sera fegnir um hesa stórfingnu bókagávuna. Og teir avgjørdu stutt sagt, at takka danska undirvísingarmálaráðharranum fyri hesa gávuna, við at senda honum eina bók, sum tey sjálvi høvdu givið út.

Hetta var bókin "Fimti á ferð", har næmingarnir hugsa sær til, hvussu ein kundi skipa eitt nýtt samfelag, har bara teir búðu. Allir næmingarnir skrivaðu sín part, og stutt eftir varð so bókin givin út.

Og líkt var til, at danski ráðharrin var sera takksamur fyri bókina. Hann sendi flokkinum eitt takkarbræv aftur, har hann við egnari undirskrivt takkar fyri fantasibókina og hugnaliga brævið, sum fylgdi við bókini.

### Goyma bókina

Í brævinum frá Bertel Haarder fegnast hann um, at næmingarnir í Hvalbiar skúla eisini hava lisið ævintýrini hjá H.C. Andersen.

- Tað er tí eisini eitt sera gott hugskot, at tit hava brúkt tykkara egnu sagnir og søgur í tykkara fantasibók.

- Tað er týdningarmikil at ein - við síðuna av lesnaði av verkum eftir kendum rithøvundum - eisini sjálvur heldur fast við frásøgugleðina, við at minnast mentanina og søguna í eins egna øki, skrivar Bertel Haarder.

Í undirvísingarmálaráðnum starvast ein føroyingur, og nú ætlar ráðharrin sjálvur at fáa hesa starvskvinnuna at siga sær frá søgnum og sagnum úr Føroyum.

- Tí fari eg at goyma tykkara bók og ansa væl eftir henni, sigur altso danski ráðharrin í brævinum.

# Nýggja vón til krabbaraktar kvinnur

**Hvørt ár fáa í miðal 25 føroyskar kvinnur staðfest krabbamein í brósti. Nú er ein nýggjur heilivágur komin á marknaðin, sum gevur nýggja vón til hesar kvinnur**

HEILIVÁGUR
*Snorri Brend*

**Krabbamein:** Vanligasta krabbameinssjúkan í Føroyum og Danmark er krabbamein í bróstunum.

Á hvørjum ári fáa í miðal 25 kvinnur í Føroyum og 4.200 kvinnur í Danmark staðfest hesa sjúkuna.

- Men nýggjur heilivágur gevur nýggja vón til hesar mongu kvinnur, skrivar heimasíðan hjá Krabbameinsfelagnum.

ATAC er tann stovnurin í heiminum, sum hevur gjørt mest burtur úr at granska krabbamein í brósti.

Kanningar hjá teimum vísa, at um kvinnur við krabbameini í brósti fáa nýggja heilivágin Arimidex beint eftir skurðviðgerðina í bróstinum, minkar vandin at fáa krabbamein aftur við 25 prosentum, í mun til um tær fáa heilivágin Tamoxifen, ið hevur verið leingi á marknaðinum.

Arimidex er eisini betri enn Tamoxifen at forða krabbameini til at breiða seg til onnur støð í kroppinum.

- Úrslitini vit hava sæð við nýggju antihormontablettunum síggja ógvuliga lovandi út, og haraftrat eru eingi hjáárin.

- Hetta er eitt lítið, men kortini gott stig tann rætta vegin fyri fólk við krabbameini í brósti, sigur Claus Kamby, sum er serfrøðingur í krabbameini við sjúkrahúsið í Herlev.

## Dixon-konsert við største pallinum

**Runavík:** Ítróttarhøllin í Runavík verður í kvøld karmur um ein stórfingna gospelkonsert, har ikki færri enn 170 sangarar fara at syngja "Gaither" saman við kenda amerikumanninum Jessy Dixon.

Fyrireikararnir hava gjørt alt fyri at geva áhoyrarunum eitt spennandi kvøld, har nógv verður gjørt burturúr at fáa høllina til eina spennandi og innbjóðandi konserthøll.

Sum skilst á teimum, hava tey eisini gjørt nógv burtur úr pallinum, sum helst er tann størsti, ið nakrantíð hevur verið í høllini í Runavík.

Øll henda stóra mannfjøldin á palli og framman fyri pall, seta hvørjum øðrum stevnu kl. 20, tá konsertin byrjar.

sb.

## 267.000 tons í føroyskum sjógvi

**Fiskivinna:** Útlendsk fiskifør hava í mai mánaði veitt 267.056,6 tons í okkara sjógvi.

Av hesum eiga íslendsk skip so nógv tann størsta partin, - heili 129.000 tons, meðan russisk skip hava veitt 82.000 tons í mai mánaði og norsk skip 36.000 tons. Meginparturin av hesi veiðuni er, ikki óvæntað, svartkjaftur.

Í mai mánaði hava skip úr Hálandi, Danmark, Bretlandi, Týskalandi, Fraklandi, Noregi, Russlandi, Grønlandi og Íslandi verið í okkara sjóøki, meðan eingi skip úr Írlandi, Estlandi og Japan hava verið her.

Íalt hava skipini havt slakar 3.600 fiskidagar, harav russar eiga 1.419, norðmenn 948 og íslendingar 598 fiskidagar.

sb.

## Vælkomin til Entré á Bryggjuni

**Keypmannahavn:** Tríggjar føroyskar listakvinnur verða teir komandi dagarnar karmur um eina serstaka framsýning á Bryggjuni. Framsýningin ber heitið "Entré" og fevnir um tekstil, keramikk og grafikk úr Føroyum.

Tita Vinther, Gurið Poulsen og Astrid Andreasen fara her, hvør á sín hátt at framsýna nakað av tí, tær dagliga útinna á tí listarliga økinum. Men henda framsýningin við hesum trimum kvinnunum fer tó langt út um teir vanligu listarligu karmarnar á Bryggjuni, verður sagt.

Framsýningin letur upp komandi leygardag kl. 16, og í samband við hetta verður ein lítil máltíð at fáa.

sb.



*Vestmenningar hava verið fegnir um fiskivinnuskúlan í bygdini. Nú er samtykt at hann skal byggjast her, og nú fer so bygdarráðið at útvega skúlanum grundøki*

## Grundøki til Fiskivinnuskúlan

**Vestmanna:** Bygdarráðið í Vestmanna fer á fundi í kvøld at viðgera eitt mál um Fiskivinnuskúlan í bygdini.

Tað hevur leingi verið greitt, at skúlanum tørvaði onnur og betri høli. Eftir at løgtingið hevur samtykt at nýggjur skúli skal byggjast, er nú túrurin komin til kommununa í Vestmanna at gera sítt til at útvega skúlanum grundøki í bygdini.

Á fundinum skal bygdarráðið tí viðgera eitt tilmæli frá teknisku nevndini í samband við eina umsókn frá mentamálaráðnum. Her verður søkt um byggiloyvi til skúlin, eins og søkt verður um sundurbýti av økinum til skúlan.

sb.